Til

Bjørn Kalsø, mentamálaráðharra 15.11..2013

**Tilmæli viðvíkjandi stavraðnum**

Vit, minnilutin í Málráðnum, mæla til at hetta verður tað løggilda føroyska stavraðið:

**a, á, b, c, d, ð, e, f, g, h, i, í, j, k, l, m, n, o, ó, p, q, r, s, t, u, ú, v, w, x, y, ý, z, æ, ø**

Eitt alfabet er ikki nøkur natúrlóg, men ein praktiskur listi við teimum bókstøvum, sum eru í brúki í einum máli. Taka vit *Føroyska orðabók* (FO), so finna vit í leitorðunum 34 bókstavir brúktar. Tað er sostatt ikki samsvar millum veruleikan í sjálvari orðabókini, og tað sum stendur í rættskrivingarreglunum í somu bók, nevniliga at "Í føroyskum skriftmáli verða 29 bókstavir nýttir." Í leitorðunum í teirri prentaðu útgávuni eru bara 29 av bókstøvunum talmerktir, hvør eftir sínum stað í raðnum, t.e. frá 1 til 29, meðan fimm stavir einki nummar hava. Tað var í ásannanini av, at samsvar ikki er millum hetta og veruleikan í sjálvari orðabókini, at henda talmerking varð strikað, tá ið FO varð endurskoðað 2009-11 av einum arbeiðsbólki á Føroyamálsdeildini. Tað var í ásannanini av, at orðabókin í roynd og veru hevur 34 bókstavir, at talmerkingin varð strikað. Tað er hesin veruleiki í modernaðum føroyskum, sum skal góðtakast.

At V. U. Hammershaimb ikki tók stavirnar *c*, *q* , *w* og *z* við (*x* hevði hann við), var, tí at hansara skriftmál var skapt til at endurgeva siðbundið føroyskt mál við sínum arvorðum. Men føroyskt í dag er annað og meira enn arvorðini. Tað verður í dag myndað av arvorðum, tøkuorðum og fremmandaorðum. Og í summum av hesum verða stavirnir *c*, *q*, *w*, *x* og *z* brúktir. Tað er tann málsligi veruleikin í dag, sum vit eiga at viðurkenna. Reglur eiga at gerast fyri, nær stavirnir skulu nýtast, og nær ikki. T.d. nýta vit *c* í *c-vitamin*, *c-moll*, *celsius*, $CO_2$ og *cm*. Vit nýta *s* fyri *c* í vanligum tøkuorðum sum *sitrón*, *sitat*, *sement* og *sosialur*. *W* nýta vit í *watt* og *x* í *marxisma* og *sex*. Stavirnar *ks* nýta vit í *taksa*, *maksimalur* og t.d. *postboks*. Sama prinsipp er galdandi fyri *z* og *q*, t.e. ortografisk purisma, sum longu er framd í verki í føroyskum orðabókum. Tann komandi Rættskrivingarorðabókin fer at vísa, nær omanfyri nevndu stavir og aðrir verða nýttir.

Viðvíkjandi kjakinum, sum var fyri nøkrum árum síðani um stavraðið, kann verða víst til samrøðu í Degi og Viku við Jógvan í Lon Jacobsen, formann í táverandi Málnevnd, og til grein eftir Jeffrey Henriksen í bløðunum um sama mundið, har teir síggja tað sum eina sjálvfylgju, at hesir nevnir bókstavir verða viðurkendir sum partur av stavraðnum (Jeffrey setti stavirnar upp sum eitt ørindi, ið kundi syngjast). Eisini er okkara tilmæli í samsvari við niðurstøðuna hjá einari samdari mentanarnevnd hjá løgtinginum í 2009.

Okkara uppskot er, at stavraðið, sum er nevnt fyrst í hesum tilmælinum, verður viðurkent og løggilt. Eisini er hetta eitt stavrað, sum allir føroyingar kenna seg aftur í. Hetta hevur als ongar negativar fylgjur fyri føroyskt sum mál, tí tað er longu praktiserað í orðabókum, tekstum og málinum yvirhøvur.

Við heilsan

Randi Meitil Hjalmar P. Petersen Eivind Weyhe